Kommunufelagið

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún 1
110 Tórshavn

Dagfesting
20. februar 2017

Okkara j.nr.

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr. 16/00414

**Viðv.: uppskoti til Løgtingslóg um Talgildu Føroyar**

Kommunufelagið hevur saman við øllum kommununum í Føroyum fingið omanfyri nevnda lógaruppskot til hoyringar, og hevur fylgjandi at viðmerkja til uppskotið:

**Almennar viðmerkingar**
Yvirskipað sæð tekur Kommunufelagið undir við, at arbeitt verður fram í móti, at Føroyar gerast undangonguland innan talgilding, soleiðis sum tað framgongur av viðmerkingunum til uppskotið.

Somuleiðis tekur Kommunufelagið undir við yvirskipaðu ætlanini um at talgilda Føroyar, soleiðis at tað er landið, ið útbyggir undirstøðukervið, sum síðani verður nýtt av umsitingum, vinnu, borgarum v. fl.

Kommunufelagið fer tó staðiliga at mótmæla, at løgtingið við lóg ásetir, at kommunurnar skulu fíggja ítøkiligu verkætlanina. Kommunurnar eru sjálvstøðugar politiskar eindir, sum hvør í sinum lagi avgera, hvørt tær ynskja at verða partur av verkætlanini.

**Ítøkiligar viðmerkingar**
Í uppskotinum verður á síðu 9 – undir fíggjarligar avleiðingar – sagt, at *"Kommunala luttøkan er lógarásett". .... Kommunufelagið og umboð fyri kommunurnar hava verið við í fyrireikingunum av Talgildu Føroyum. Fíggjarmálaráðið hevur samskifti við Kommunufelagið um fíggingarleistin."*

Í hesum broti verður upplýst fyri Løgtinginum, at Kommunufelagið og umboð fyri kommunurnar hava verið við í fyrireikingini, og at Fíggjarmálaráðið hevur samskift við Kommunufelagið um fíggingarleistin. Gaman í er Kommunufelagið kunnað um fíggingarleistin, men hetta kann ikki nýtast sum undanførsla fyri at tvinga kommunur, sum ikki ynskja tað,  at vera við í fíggingini.

Á síðu 5 í uppskotinum verður, undir yvirskriftini "Breið kjølfesting" sagt, at Talgildu Føroyar byggir á eitt tvørgangandi samstarv. M.a. verður sagt, at tað er avgerandi, at land, kommunur, almennar fyritøkur, felagsskapir, grunnar og privatar fyritøkur samstarva um fígging og menning. Landið hevur høvuðsábyrgdina og eigur verkætlanina, og rindar eisini størsta partin

av henni. Somuleiðis verður á síðu 6 í uppskotinum sagt, at Fíggjarmálaráðið hevur málsøkið talgilding um hendi, og er sostatt eigari av verkætlanini.

Um verkætlanin er kjølfest í breiðum samstarvi um fígging og menning, so átti ikki at verið neyðugt við einum lógaruppskoti, ið tvingar kommunurnar at luttaka í fíggingini.

Avtala átti hinvegin at verið gjørd við kommunurnar, eins og við privatar fyritøkur, um felags fígging.

**Kommunala sjálvræðið**
Landið hevur ikki heimild at áleggja kommununum at luttaka í og fíggja eina ávísa landsverkætlan, og hetta lógaruppskotið loysir ikki henda heimildartrupulleika.

Kommunustýrini eru ovasti myndugleiki til at gera av, hvussu kommunalur peningur skal nýtast, um tað ikki er beinleiðis álagt í lóg, at kommunan hevur ábyrgdina av eini ávísari uppgávu, og samstundis ber útreiðslurnar av uppgávuni.

Sambært meginreglum í stýrisskipanarlógini og í grundlógini hava kommunurnar rætt til at skipa egin viðurskifti undir eftirliti av landsmyndugleikum. Hetta er tað kommunala sjálvræði, ið verður mett sum ein so týdningarmikil táttur í einum demokratiskum samfelagi, at staðarbundið sjálvræði er tryggjað bæði í stýrisskipanarlóg, í grundlógini og í evropeiskum høpi í evropeisku konventiónini um lokalt sjálvstýri.

Tær uppgávur, sum kommunurnar taka á seg ella fáa álagt, hava heimild í lóggávu ella sokallaðu kommunalfulltrúini. Harumframt hevur siðvenjan verið, at áðrenn uppgávur verða fluttar frá landi til kommunur, eru samráðingar farnar fram millum land og kommunur um, hvat kommunur skulu yvirtaka av uppgávum og hvussu hetta skal fíggjast.

Tað verður mett sum álop á kommunala sjálvræðið at noyða kommunurnar at gjalda til eina verkætlan, sum landið eigur. Landið kann ikki bara uttan víðari áleggja kommununum at taka lut í fíggingini av eini landsuppgávu, uttan at hetta er liður í, ella avleiðing av, at ein landsuppgáva samstundis verður løgd út til kommunurnar at umsita.

Innan rættarvísindi verður um § 82 í grundlógini m.a. sagt,

"…at tilgangen af og rådigheden over kommunens økonomiske grundlag må være tilrettelagt og sikret på en sådan måde, at selvstyret i betydningen dispositionsfrihed forbliver en realitet" (Zahle,2006:599).

Tað er ein grundleggjandi meginregla, at kommunalt sjálvræði ber í sær, at kommunurnar hava rætt til sjálvar, innan galdandi lógarkarmar, at gera av, hvussu tær nýta tann pening, ið tær hava at ráða yvir.

Kommunurnar hava heldur ikki heimild at nýta kommunalan pening til onnur áhugamál enn tann kommunala áhugan hjá viðkomandi kommunu, soleiðis at skilja, at kommunalar útreiðslur á ein ella annan hátt skulu koma borgarunum í kommununi til góðar.

Kommunufelagið

Lógaruppskotið, soleiðis sum tað nú sær út, áleggur bert kommununum eina útreiðslu, uttan at henda útreiðsla er knýtt at nakrari ávísari uppgávu, sum kommununum er álagt at útinna ella hava ábyrgdina av. Lógaruppskot tekur 25,5 milliónir úr teimum kommunalu kassunum við tí endamáli at fíggja eina ítøkiliga verkætlan, sum landið eigur.

Tað, at kommunurnar verða tvungnar at fíggja eina landsverkætlan – uttan at ein kommunal uppgáva samstundis harvið verður loyst – er at meta sum eitt ognartøkulíknandi inntriv móti kommunalu kassunum. Hetta kann sjálvsagt ikki góðtakast.

Kommunali leikluturin er óivað týdningarmikil tættur í verkætlanini, men Kommunufelagið dugir ikki at síggja í uppskotinum, hví tað er alneyðugt, at allar kommunurnar – eisini ímóti teirra vilja - skulu luttaka í fíggingini av verkætlanini, fyri at tað kommunala aspektið er umboðað. Tær kommunur, ið ynskja at luttaka í menningini og fíggingini, kunnu vera við og tær kommunur, ið ikki ynskja longu nú at vera við, kunnu luttaka, tá verkætlanin er ment soleiðis, at tær síggja ein fyrimun í at vera við.

Mælt verður í staðin til, at § 1 verður broytt soleiðis, at stk. 4 og 5 verða strikaði og at Landsstýrinum í staðin verður veitt heimild í stk. 3 at gera avtalur við kommunurnar.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri